# Dánial Pauli í skúla í Hollywood



**Navn:** Dánial Pauli G. Dalbø
**Bústaður:** Los Angeles, San Fernando Valley, California
**Starv:** Lesi filmkunnleika á Columbia College, Hollywood

*Hvat ætlar tú tær at nýta komandi summar til?*
Eg gangi í skúla og havi bert eina viku summarferiu. Tað ger, at eg ikki havi tíð til alt, sum eg havi hug til. Ta einu vikuna fari eg nokk ein túr til Føroyar á G!-festival. Restina av summarinum fari eg at njóta í Los Angeles og her á leiðini.

*Fortel eitt sindur um, hvat ein kann uppliva í L.A.?*
Her eru nógv góð matstøð, náttarlivið er í topp, og strendurnar eru frálíkar. Hetta er eitt paradís fyri surfarar. Sjálvur dugi eg ikki at surfa. Eg havi ikki roynt roynt tað enn, men eg trivist væl bara at liggja á strondini og sóla mær. So kann líka leggjast afturat, at her er sól hvønn dag.

Tá ein vitjar L.A., eru tað nøkur støð tú mást fara. Walk of Fame, tann heimskenda biografin Chinese Theater, Universal Studios, Disneyland, Six Flags o.s.v.

Her er eisini sera nógvur ítróttur til allar ítróttarfjeppararnar, men av tí at eg ikki eri nakar fjeppari av amerikanskum ítrotti, bíði eg til David Beckham kemur í summar, men tá fari eg heilt víst til onkrar dystir hjá L.A. Galaxy og hyggi eftir vanligum fótbólti.

Sjálvandi er sera nógvur tónleikur at hoyra í L.A.. Havi sjálvur júst verið á MUSE-konsert og fari heilt sikkurt á nógvar konsertir seinni í ár.




















